

**Lat teg í tína nýggju skjúrtiblusu, finn mammusa fótsíða skjúrt úr skápinum, bind eitt breitt gullbelti um miðjuna og lat hendurnar glíða niður í einar lekrar, reyðar silkihandskar. Smoygg so elegantu stilettirnar á føturnar, tak møttilin á ryggin, og tí kanst fara á ólavsøku í føroyskum klæðum uttan at líkjast øllum hinum.**

Um tú torir at geva hugflognum luft undir veingirnar, eru møguleikarnir við føroysku klæðunum óendaligir. Og hvør veit – kanska tað er júst hetta, ið skal til, fyri at fáa ungu genturnar at brúka klæðini oftari?

**Stimatroyggjan, vit brúka í dag, er mynstrað í tveimum litum, ið hóskar til skjúrtið, men var áður einslitt í myrkabláum. Hesar troyggjurnar síggjast sjáldan longur. Troyggjur og skjúrt í trimum litum og mynstrut brist var eisini vanligt fyrr.**

**Finn stimatroyggjuna fram, hoppa í tínar yndis buksir og pifta tað heila upp við nýggju leðurhandskunum. Um tú heldur vilt sleppa at vísa diskretu tatoveringina á øklinum, skiftir tú bara buksurnar út við lærstutta niðurdeilin.**

Tey føroysku klæðini, vit kenna í dag, vóru ikki av álvara brúk, fyrr enn annar verðaldarbardagi var av. Tað var sjáldan, at ungar gentir áttu føroyskan tjóðbúna áðrenn kríggið. Føroysku klæðini vóru upprunaliga ein arbeiðsbúni, men gjørdist fín aftaná 60 árini.

Bundnaturriklæðið til tey føroysku klæðini varð bara brúkt til arbeiðsklæðir fyrr, men eisini tey eru vorðin modernað, og eru nú ofta at síggja í ymsum samansetingum.

**Í dag er møttilin ofta fótasíður, men gekk ikki niður um miðjuna fyrr.**

**Vanligt var, at fólk lótu seg í myrk, føroysk klæðir, tá ið tey gjørdust gomul, meðan bláu klæðini vóru syrgibúni. Í dag er heilt vanligt at síggja ungar gentur ganga í bæði bláum og grønum tjóðarbúna. Bæði konufólk og mannfólk kunnu vera í morreyðum klæðum í dag, men morreyði liturin var upprunaliga bert til mannfólk.**